tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 126 Hósdagur 4. juli 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

## Skotini geltu millum húsini á Eiði:

# Ótangar skutu tarv við riflu millum hús



Vetringurin hjá kommunufelagsformanninum, Jógvani í Løðuni á Eiði lá eftir á, tá skotið varð við riflu ímillum húsini á Eiðimánadagin. Løgreglan tekur málið í størsta álvara. Síða 10

# Eru ónøgd við trygdina



Danop ætlaði at seta álitið á sivilverjuna, skuldi eitt óhapp hent, nú boringin byrjar í Lopra. Kommunan vil hava trygdina í lagi, áðrenn boringin byrjar. Síða 6

*Kjartan Hoydal:*

# Ófullfíggjað og beinleiðis misvísandi



*Kjartan Hoydal vil hava svar frá landsstýrinum.*

Kjartan Hoydal, fyrrverandi fiskivinnustjóri er misnøgdur við, at tilfarið, sum landsskrivstovan hevur sent kanningarrættinum í bankamálinum, er so ófullfíggjað. Síða 8-9

VIT KOYRA ALT SLAG AV
VØRUKOYRING
FLYTING ÚR FØROYUM TIL FØROYA
VIT HAVA FLYTIKASSAR, GOYMSLU OG KAPPINGARFØRAR PRÍSIR
TILBOÐ VERÐA GIVIN
O.A. VØRUKOYRING
17727 · 88727

Havamold
Spagnum.
Moss Peat
100 ltr., 78,-
200 ltr., 129,-
damor
Kvíggjartún 3 Argir
Tlf. 15415

